## Sekkjaður fyri opnum skíggja

Leo Beenhakker, hollendski venjarin hjá Póllandi, fekk í gjár sekkin. Fyri opnum sjónvarpsskíggja staðfesti forsetin í pólska fótbóltssambandinum, Grzegorz Lato, at Beenhakker ikki longur er venjari, eftir at liðið í gjár tapti 3-0 móti Sloveina. Pólland hevur framvegis møguleikan at gerast nummar tvey í sínum bólki og harvið vinna sær rættin til play-off dyst um HM-billettir.



## Claus til Fleetwood

Claus Bech Jørgensen, sum undir Henrik Larsen var týðandi partur av føroyska landsliðnum, hevur nú funnið sær nýtt felag. Eftir eina miseydnaða roynd at fáa sáttmála við Port Vale, hevur Claus Bech Jørgensen nú skrivað undir sáttmála við Fleetwood Town FC, sum spælir í fimtu bestu ensku røðini. Sáttmálin er galdandi fyri eitt ár, skrivar bold.dk.

# Stríðsviljin var framúr

**Tað kann kanska tykjast nyttuleyst at meta um spælaraavrikini, tá fagnaðurin um sigurin skuggar yvir alt annað. Ein roynd verður kortini gjørd at lýsa taðs, um stríðshugaðu føroysku spælararnir sýndu, tá nummar 62 á FIFA-styrkislistanum varð gúppað stigaleyst av Svangaskarði**




Jákup Mørk

### 1. Jákup Mikkelsen, KÍ (65 dystir/0 mál)

Í seinasta heimadysti sínum fyri A-landsliðið segði Jákup Mikkelsen áskoðarunum farvæl á best hugsandi hátt. Brotssparkið fekk hann so einki gjørt við, og hann hevði onkra kanónbjarging í seinna hálvleiki, tá trýstið var støðugt og stórt. Hinvegin var hann nakrar ferðir fangaður upp á millumhond, tá litavar sendu langt móti handara stólpa, men lukkutíð slapp hetta ikki at oyðileggja góða dagin.

### 2. Johan Troest Davidsen, NSÍ (13/0)

Var komin fyri seg eftir skaða í fótliðnum, men hóast fráveran frá dysti hevur vart einar tríggjar vikur, tóktist hetta ikki at nerva tað minsta. Var sera tryggur í verjuspælinum, har hann sjáldan varð yvirspældur, og vann hópin av nærdystum. Eisini við at trekkja inn at hjálpa miðverjuni. Staðfesti aftur, at hann er sjálvskrivaður partur av føroysku verjuni – mest sum líkamikið, hvat at teimum fýra plássunum hann verður settur at røkja.

### 3. Einar T. Hansen, NSÍ (8/0)

Fekk endurval hóast ikki so sannførandi avrik í Eysturríki. Og hann reisti seg við manér. Var frá fyrsta bríksli í krovinum á beinleiðis mótstøðumanni sínum, sum sjáldan slapp serliga væl framat í álopspartinum. Var kanska ikki altíð so beinrakin í avspælinum, men tað konsekvensur og ferð yvir spælinum, og við avrikinum staðfesti Einar, at hann framvegis skal roknast sum ein seriøsur kandidatur til bakkplássið, hóast hann er leikabnnaður næstu ferð.

### 4. Atli Gregersen, Víkingur (4/0)

Hóast landsdystartalið ikki er tað heilt stóra enn, so er hugaligt at síggja, hvussu autoriteturin hjá Atla tykist at veksa fyri hvønn dystin. Virkaði í longum løtum mikukvøldið sum veruligur stýrimaður í verjuni, har hann sjáldan lat nakran litava fáa nakað sum helst í nærdystum. Mongu innleggini hóskaðu honum heldur ikki illa, og saman við nýggja makkaranum gjørdist Atli ein rættiliga sentralur persónur í dystinum.

### 5. Bartal Eliasen, ÍF (6/0)

Kanska óvæntað gjørdist hann partur av verjuni, og tað skuldi vísa seg sum eitt framúr skilagott val av Brian Kerr. Tað kann væl vera, at Bartal hevði havt trupulleikar móti einum liði, sum hevði hildið bóltinum meira á jørðini. Men tað gjørdu litavar ikki, og tí var tað eitt framúr skilagott val. Var kanska eitt sindur nervøsur fyrstu løtuna, og hann var maðurin, sum framdi heldur bíliga brotssparkið, men so er ikki meira negativt at siga. Átti loftrúmið, har sum hann var, og neyvan verður litaviski landsliðsvenjarin bilsin, um onkur í dag sigur honum, at talan altso var um ein av bestu flogbóltsspælarunum í landinum.

### 6. Jann Ingi Petersen, NSÍ (15/0)

Skuldi yvirtaka leiklutin hjá Fróða Benjaminsen, og lyfti hetta við einum framúr arbeiðsavriki. Var serstakliga sjónligur fyri steðgin, tá hann vann eitt hav av nærdystum, umframt at hann mest sum altíð slapp sær skilagott av við bóltin aftur. Avspælið haltaði kanska nakað eftir steðgin, tá trýstið á føroyska liðið bara vaks. Men arbeiðsavrikið var framvegis tað sama, og tá var tað eisini hetta, sum hevði størsta týdningin.

### 7. Jákup á Borg, B36 (59/2)

Varð settur á offensiva miðvøllin, og framdi har eitt framúr avrik, har hann eisini var við í uppspælinum til bæði málini. Var fyri steðgin ein av krumtappunum í freka og avbjóðandi føroyska spælinum, og vann eisini hópin av bóltum. Hóast stóra arbeiðsavrikið byrjaði at seta síni merki eftir steðgin, stríddist hann ótroyttiliga í verjupartinum, eins og hann fleiri ferðir var frammi at stressa litaviska uppspælið. Prógvaði fyri øllum, at hann framvegis er ein týðandi partur av hópinum, men má so bíða til Rumenia, áðrenn hann fær møguleikan at runda teir 60 dystirnar.

### 8. Símun Samuelsen, Keflavík (26/1)

Hevur veruliga ferðina til at bjóða av, og fyri steðgin varð hetta eisini prógvað óteljandi ferðir við góðum renningum og gjøgnumbrotum. Tað var eisini eitt av hesum kastaði frísparkið til fyrsta málið av sær. Hevði eisini dirivið til at royna seg við skotum, og hóast hesi ikki raktu heilt har, sum tey skulu, var hetta avgjørt við til at órógva mótstøðuverjuna. Er eisini millum



Teir 11, sum byrjaðu inni í dystinum mikukvøldið. Hvør sum ein framdu teir e

leikbannaðu spælararnar til næsta dystin, og tað verður ein veruligur saknur í føroyska álopsspælinum.

### 9. Súni Olsen, Víkingur (37/3)

Var maðurin, sum, við einum dreymahøggið sparkaði Føroyar á sigurskós eftir lítlum korteri. Var aftur hesa ferð ein týðandi partur av føroyska miðvøllinum, men dysturin, sum sat í beinunum, hevði við sær, at hann ikki dekkaði eins stórt arbeiðsøki, sum miðvallarfelagararnir gjørdu tað. Djúpu sendingarnar vóru tó sera týðandi partur av føroyska álopsspælinum, og tekniski førleikin bar við sær, at hann ofta slapp væl úr nærdystunum, eins og hann vann fleiri fríspørk.

### 10. Christian Lamhauge Holst, Silkeborg (17/2)

Var nakað óvæntað tikin út á kantin hesaferð, og tóktist hann ikki trívast